# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Atgongumerki til landsdystir við avslátri

**FSF bjóðar fólki at keypa atgongumerki til heimadystirnar hjá landsliðnum í 2009 fyri avsláttarprís. Tilboðið er galdandi í desember**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

FSF bjóðar nú fólki at keypa atgongumerki til teir tríggjar heimadystirnar í HM-undankappingini fyri avsláttarprís. Fólk kunnu keypa eitt gávukort at geva øðrum - ella sær sjálvum - til jóla. Við einum gávukorti sleppur ein vaksin persónur til allar tríggjar HM-undankappingardystirnar hjá føroyska A-landsliðnum fyri ein samlaðan kostnað uppá 350 krónur. Eitt barn sleppur til allar tríggjar landsdystirnar fyri 100 krónur. Heimadystirnir hjá føroyska A-landsliðnum, sum talan er um, eru 10. juni móti Serbia, 12. august móti Fraklandi og 9. september móti Litava.

Dystirnir verða allir spældir á Tórsvølli, og í góðari árstíð. Gávukortið gevur tó ikki atgongd til ein møguligan vinardyst, um føroyska landsliðið spælir ein slíkan á heimavølli í 2009. Við einum gávukorti kann ein eisini tryggja sær eitt gott pláss á Tórsvølli. Her er talan um rættiliga umfatandi avsláttur. Gjøgnumsnittsprísurin plagar at liggja um tær 200 krónurnar, so fyri ein vaksnan persón eru umleið 250 krónur at spara. Og so slepst sjálvandi eisini undan bíðurøðunum, sum ofta eru, tá keypast skal í seinastu løtu. Gávukortini kunnu bíleggjast gjøgnum heimasíðuna hjá FSF, www.football.fo, frá nú og til jóla.



*Í fjør funnust fólk at, at atgongumerkini til landsdystir hjá FSF vóru ov dýr. Nú ber til at keypa samlaðan pakka til tríggjar landsdystir fyri 350 krónur*

# Grand Prix kapping hildin í Klaksvík

**Nú verður loksins aftur kappast í badminton í Klaksvík. Kappingin komandi leygardag verður ein Grand Prix kapping.**

BADMINTON

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar ætla nú at gagnnýta, at teir hava fingið optimalar umstøður, til at spæla badminton, og fer tað nú at síggjast aftur í virkseminum hjá Klaksvíkar Badmintonfelag. Komandi leygardag stendur ein Grand Prix badmintonkapping á skránni. Henda Grand Prix kappingin er liður í eini størri, og meiri umfatandi kapping, sum verður avgjørd, tá kappingarárið 2008/2009 endar. Nógv yngri fólk íðka badminton í Klaksvík nú, og gevur tað eitt gott grundarlag fyri slíkum kappingum.

Grand Prix kappingin er fyri børn og ung. Talan er um tríggjar aldursbólkar. Tey, sum eru undir 11 ár, 13 ár og 15 ár. Badmintonspælarar úr øllum landinum fara at taka lut í kappingini. Klaksvíkar Badmintonfelag sigur í einum tíðindaskrivi, at kappingin byrjar klokkan 10 leygardagin, við teimum sum eru undir 11 ár. Kappingin heldur síðani fram við teimum sum eru undir 13 ár klokkan 13, og endar við luttakarunum, sum eru undir 15 ár klokkan 15.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Christian Høgni er nummar trý

Á yvirlitinum hjá AB yvir málskjúttar og spælarar, sum hava lagt upp til málini hjá AB, teir fyrstu 15 dystirnar í hesum kappingarárinum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, er føroyski landsliðsspælarin nummar 3. Telur ein bara málini við, so liggur Christian Høgni Jacobsen á einum deildum 1. plássið saman við Poul Hübertz.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Poul Hübertz | 6 mál | 4 assist | samanlagt 10 |
| David Boysen | 4 | 3 | 7 |
| Christian Høgni | 6 | 0 | 6 |
| Klaus Lykke | 2 | 4 | 6 |
| Martin Heinze | 0 | 6 | 6 |
| Casper Andersen | 4 | 1 | 5 |
| Glenn Darlie | 2 | 3 | 5 |
| Henrik Lyngsø | 2 | 0 | 2 |
| Kenni Olsen | 1 | 1 | 2 |
| Anders Theilgaard | 1 | 1 | 2 |
| Thomas Asmussen | 1 | 0 | 1 |
| Niclas Rønne | 1 | 0 | 1 |
| Rasmus Nielsen | 0 | 1 | 1 |
| Kenneth Bjergsted | 0 | 1 | 1 |
| Thomas Jari | 0 | 1 | 1 |
| Andreas Sørensen | 0 | 1 | 1 |
| Mads Villadsen | 0 | 1 | 1 |
| Sjálvmál | 1 | | 1 |

-heris